

*Karl, Abraham og Bogi staddir við Løkin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Niðri í Danmark er talan um eina nógv harðari kapping. Um onkur hevur tørv á at seta niður á teg, fyri sjálvur at gerast betri, ja, so gera teir tað, greiðir Bogi álvarsamur frá.

Eitt greitt dømi um, at tað er ikki bara gamansleikur at fara uttanlands at royna sín fótbóltsførleika.

– Men tað gjørdi, at tú bleiv herdaður sum persónur, og fótbóltsliga vil eg siga, at tað er sunt at verða sálarliga sterkur. Tað er jú eisini nakrar dygdir ein roynir at framala í fótbóltsspælarum, slær Bogi fast.

Tað hjálpti, at leirvíkingurin, Andreas Lava Olsen spældi í Frem samstundis, men Bogi leggur herðslu á, at tað var týdningarmikið hjá føroysku spælarunum ikki at hava eina ov stóra frástøðu frá hinum í hópinum.

## Hevur eina góða kenslu

Abraham er sum venjari væl nøgdur við farna kappingarár, og hann situr eftir við einari góðari kenslu.

– Eg vildi sjálvandi altíð ynskt, at vit høvdu gjørt tað eitt sindur betri, men í tí stóra og heila, so eri eg nøgdur við kappingaárið, slær Abraham fast.

Ætlanirnar fyri komandi kappingarár byrja so smátt at koma á tekniborðið, og Abraham hevur eisini sett fram nøkur ynski, sum hann og nevndin í ÍF samskifta um.

– Vit mugu so síggja hvat fer at bera til, men sum venjari havi eg ikki ynskt at fáa so ræðuliga nógvar nýggjar spælarar. Tað, sum eg kundi hugsað mær, er at fara eftir tí, sum vit tørv á. Ikki bara at royna at fáa eina rúgvu av fólki til felagið, men heldur at fáa tær røttu persónligheitirnar, og tær røttu spælitypurnar til ÍF, greiðir Abraham frá. Hann arbeiðir við hesum ætlanunum í høvdinum, og so fer tíðin at vísa hvussu nógvar av hesum verða førdar út í lívið.

## Undirhildu kanska ov nógv

Abraham hevur bæði sum spælari og venjari verið ein garantur fyri tí framrættaða spælinum, men sæð í bakspeglinum, so hevði hann ynskt, at tað kanska var lopið eitt sindur minni á, og heldur bundið betri fyri afturi á vøllinum.

– Eg vil siga, at tað eydnaðist næstan ov væl hjá okkum at spæla undirhaldandi fótbólt. Tað bleiv ov ofta talan um ov nógv mál í tí skeiva endanum av vøllinum. Men stórt sæð vil eg siga, at vit vóru millum tey liðini í vodafonedeildini, sum spældu mest undirhaldandi, greiðir Abraham frá, uttan nakran iva í røddini.

– Eg trúgvi innast inni, at høvdu vit spælt meira uppá at halda tætt, og standa longri afturi á vøllinum, so høvdu vit óivað havt eina betri endastøðu á stigatalvuni. Men so høvdu spælarnir als ikki havt stuttleikan av at spæla fótbólt, og eg trúgvi heldur ikki, at spælarnir høvdu verið líka hugagóðir.

## Serstakt við pápa sum venjara

Spurdur um hann ikki kundi hugsað sær at verið á sama liði, sum Karl til komandi kappingarár, svarar Bogi, at tað hevði sjálvandi verið stuttligt, men hann kann ikki staðfesta, um tað verður støðan í 2011. Bogi hevði leikbann, tá NSÍ og ÌF møttust í seinasta triðinginum av kappingini í ár, so hann fekk ikki royntseg í dysti ímóti yngra beiggjanum og pápanum.

Karl viðgongur, at tað er eitt sindur serstakt at hava pápa sín sum venjara, men hann hevur givið pápa sínum heimild at skelda seg líka nógv, sum ein einhvønn annan spælara hjá ÍF, um tørvur er á tí.

Abraham leggur dent á, at tá hann evaluerar dystin aftaná leiklok, so hugsar hann ikki um Karl, sum sítt avkom, men sum einhvønn annan ÍF-spælara. Abraham staðfestir hinvegin, at viðhvørt er tað eisini neyðugt at samskifta við spælarar undir fýra eygum, eisini Karl.

Abraham dugir eisini at bera rósandi orð til spælarar, tá teir hava staðið seg væl. Tann opni spurningurin til komandi kappingarár stendur so eftir. Verða allir tríggir Løkin-mennirnir at finna við Skarðsá í Fuglafirði í 2011, og verða teir tá allir á útivølli við Løkin í Runavík?

*heris@sosialurin.fo*

HOYR RADIOSAMRØÐUNA VIÐ KARL, BOGA OG ABRAHAM LØKIN Á RÁS2, **FRÍGGJADAGIN KLOKKAN 15.15**

Rás 2 títt radio